# Undirvísingargongd til *Lotta í Brakarastræti*




**Astrid Lindgren**

***Lotta í Brakarastræti***

Myndir: Ilon Wikland
Týtt: Ebba Hentze
Bókadeild Føroya Lærarafelags 1997

**Um bókina**

Bókin, sum Astrid Lindgren hevur skrivað, og Ilon Wikland hevur teknað, er um 5 ára gomlu Lottu, sum býr í Brakarastræti saman við mammuni, pápanum og systkjunum Jónasi og Miu-Mariu. Um dagin eru mamman og Lotta heima, meðan systkini eru í skúla og pápin er til arbeiðis.

Lotta eigur eina grísabamsu, sum hon er ógvuliga góð við, men hendan morgunin er okkurt hent við bamsuni, og Lotta er í ringum lag, tá ið hon vaknar. Hon er ill við mammuna og vil ikki gera sum mamman vil og endar við at klippa troyggjuna, sum hon skuldi í, sundur. Eftir hetta verður lagið enn verri, og hon ger av at flyta.

Í grannalagnum býr Berg gumma, har flytur Lotta inn á skrambulloftið, púra einsamøll. Lottu dámar væl at vera einsamøll á loftinum, men tá ið myrkrið kemur, og Lotta skal sova, so er ikki serliga stuttligt longur. Tað endar við, at pápin kemur eftir henni, og hon flytur heim aftur.

**Uppgávur**

Anni Sørensen hevur gjørt uppgávubókina til *Lotta í Brakarastræti*.

Uppgávubókin hóskar væl at brúka í 3. flokki í føroyskum.
Dentur verður lagdur á mállæru, serliga verður nokk so fitt arbeitt við navnorðum og sagnorðum. Nomið verður eisini við lýsingarorð.
Arbeitt verður eisini við at skilja lisna tekstin og við marghátttaðum teksti (orð og mynd). Í onkrum uppgávum skulu tey tekna. Stavseting verður vand.

Uppgávurnar egna seg væl til sjálvstøðugt arbeiði, men kunnu eisini gerast í bólki.

Vit meta, at tað tekur umleið 24 undirvísingartímar at lesa bókina og gera uppgávurnar. Skiftast kann ímillum, at lærarin lesur bókina fyri næmingunum, meðan tey fylgja við í egnari bók, næmingarnir lesa í bólki ella tey lesa ein og ein.